# Don Petersen fer um tey 60



6. oktober er ein dagur, sum mangir føroyingar seint fara at gloyma. Fyri 17 árum síðani var hetta ein lagnudagur fyri føroyska búskapin og føroysku bankaverðina. Men hetta var samstundis dagurin, tá Don Petersen á Tvøroyri fylti 43 ár.

Tíðin hevur broytt mangt og hvat í mannalívinum hesi árini síðani 1992. Og í dag - týsdagin 6. oktober 2009 - er dagurin, tá hesin garpurin av Tvøroyri verður 60 ár. Ja, hvør skuldi trúð tí?

Síðani Don fyri mongum árum síðani byrjaði lívsstarv sítt sum pleygari innan psykiatriska økið, hava mong fólk notið gott av tí fakliga dugnaliga, altíð so vælupplagda og orðsnilda suðringinum.

Á psykiatriska økinum hevur Don ikki spart seg, men hevur við síni sermerktu dialekt sett dám á tað fakliga tjakið millum starvsfólkini fyrst og fremst, men eisini mótvegis læknunum, og hevur ongatíð óttast fyri at siga frá, hvønn viðgerðarhátt hann helt vera tann rætta fyri tann einstaka sjúklingin. Hann hevði altíð eyga fyri tí einstaka sjúklinginum. Hann hevur púra greiðar meiningar um, hvør heilivágur er bestur og hvør viðgerð annars hann helt vera tann rættasta. Og tað er ikki frítt, at bæði røktarfólkið og læknarnir hava lurtað eftir honum og hava mangan tikið hansara metingar til eftirtektar.

Don hevur arbeitt fulla tíð sum pleygari á psykiatriska deplinum, og her hevur hann ikki spart seg á nakran hátt. Hann hevur altíð tikið eitt eyka tak tá ástóð, og serliga um kvøldarnar og um náttina hevur hann trivist best. Og tað er eisini í hesum vaktum at fólk hava upplivað Don frá teirri bestu síðuni: Altíð skemtiligur, sakligur og púra púra greiður, m.a. tá talan er um politikk, fótbólt og útjaðaran.

Okkara kæri Don hevur eisini mong ymisk áhugamál. Familjan telur nógv hjá honum, og haraftrat hevur seyðahald nógv at siga, eins og hansara arbeiðsroyndir, skjóthugsan og tora-at-siga-tað-beint-fram-holdningur hava verið fakfelagi hansara at gagni.

Hóast Don úteftir kann tykjast harður og cool, so hava hann og hansara allarnærmastu eisini upplivað álvarsamar løtur, tá skalið fall og tann sanni Don kom fram og vit skiltu, at handan fasaduna bankaði eitt gott, erligt og bleytt hjarta.

Henda stóra dagin í dag kundi verið so nógv annað gott at sagt um Don Petersen. Tað lata vit liggja hesaferð. Eingin ivi er um, at meiri verður at "frætta" um Don, tá hann seinni í mánaðinum hevur boðið til stórt føðingardagshald á Tvøroyri.

Hav ein góðan føðingardag Don, og mangar góðar dagar eftir henda!

**Starvsfelagi á Deild 2**







## Grønlandstíðindi Kári við Stein

Grønlandstíðindi:

# Tórsvík verið inni í Grønlandi

**Kári við Stein greiðir frá seinastu tíðindini úr Grønlandi. Tað eru nógvar avreiðingar, og Tórsvík er eisini á hesum leiðum**

**16. september**
Qaqqatsiaq kom inn at landa í morgun við fullari last. Markus er í Aasiat og millumlandar.

**17. september**
Akamalik kom inn seinnapartin at landa. Teir hava eisini fulla last. Krabbakvotan her i Sisimiutøkinum er liðug. Allir teinar skulla vera uppi úr sjógnum mánadagin, og tað er eisini síðsta freist at avreiða.

**20. september**
Natarnaq kom inn í nátt við hálvari last. So skuldu teir koyra tvey nýggj trol undir. Tey vóru komin úr Føroyum frá Vónini.

**21. september**
Natarnaq var liðugur at landa í kvøld. Teir skulla sigla í morgin árla. Teir skiftu fólk eisini. Lómur kom til Illulisat við 150 tonsum av ísaðum rækjun eftir knapt trimum samdøgrum. Tað er nokk tað mesta, sum har hevur verið.




*Tað er hugaligt at føroyingar fáa viðurkenning aðra staðni sum tað sæst í hesum stubba í grønlendskum blaði. Anna er abbadóttir kenda skiparan Kaj Johannesen*

**24. september**
Tað er hvítt í bakka. Ocean Tiger kom inn at landa og skifta fólk. Teir hava 270 tons inni. Tveir av manningini fóru á flot við mobbátinum. Teir fingu 15 kurvar, um 1000-1100 pund, og slagið var gott. Hetta er tað mesta, teir hava fingið við snøri eftir góðum trimum tímum. Agnið er eitt loyndarmál, men tað kemur úr frystaranum hjá kokkinum.

Og so kom Tórsvík hjá Tormonnunum úr Hósvik. Teir komu inn at skifta manning, og taka nakað av provianti út til Atlantic Explorer. Teir høvdu ein sjúkan mann inn við frá trolaranum Sisimiut, sum liggur har vesturi saman við øðrum trolarun og fiskar svartkalva.

Enniberg er komin her upp eftir einari kvotu uppá 200 tons. Ocean Tiger loysti kl 20 í kvøld. Teir koma inn aftur 8. oktober at landa. Frætt er frá Polar Assik. Teir hava gjørt fleiri túrar, og tað hevur veri í lagi við mongdini, sum teir hava landað.

**28. september**
Vit hava haft hvítt í bakka í eina góða viku og lorta veður. Nú hálvdi hann heilt yvir um við regni í gjár og tað sama í dag, so kavin minkar. Polar Qassiut kom inn í morgun at landa við fullari last. Har var alt fult hjá teimum. Regina C er inni í Manitsoq og landar í dag.

**29. september**
Tað er Mikkjalsmessudagur og tíð at fara eftir veðrum. Polar Nanoq er inni í Aasiat og landar svartkalva . Akamalik kom inn seinnapartin at millumlanda, tá Polar Qaasiut var liðugur at landa. Akamalik hevur gott og væl hálva last.

Manu, sum fór út 11 september, hevur fingið gott 200 tons av svartkalva, síðani teir fóru út aftur. Teir skulla inn at landa 6. oktober í Manitsoq. Polar Natarnaq hevur verið í Nuuk og landað sekkjarækjur. Har var næstan fult hjá teimum. Nú er so nýggj manning komin umborð .

**30. september**
Tað er av besta veðri. Kavin er við at vera horvin. Tann lítli kanadiarin OUJUKOAQ kom inn við fullari last av svartkalva. Teir royna við gørnum beint vestur úr Sisimiut. Steffen C er inni í Manitsoq og landar í dag.

**1. oktober**
Tað er dýrdarveður. Markus kom inn at landa í morgun við fullari last. Teir fóru á flot við Mobbaranum, vóru burtur í ein lítlan tíma og fingu um 200 pund av fiski. Í dag tók fiskurin gummibeituna. Markus skal sigla í morgin árla so skjótt sum skiparin kemur úr Streymfjøðinum. Har var sum vanligt hjá Air Greenland, seinkan vegna tekniskar trupulleikar.